
Veðrið




Fimm – daga-forsøgnin frá DMI


Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur, greiðir frá um veðrið



Veðrið í dag:
Gul til stívt andøvsgul av suðri, skýggjað og mjørki í støðum. Út á dagin landsynningur og eystan, hann veksur vindin til hvassan vind og regn. Hósnáttina støkkur hann vesturum og minkar vindin. Hitin millum 11 og 14 stig.



Veðrið hósdagin:
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi og suðri og stundum regn ella ælingur. Hitin millum 9 og 13 stig.



Veðrið friggjadagin:
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av suðri og regn. Út á dagin snarar hann í útnyrðing og minkar vindin. Ælingur og hitin millum 9 og 13 stig.

Veðrið leygardgin og sunnudagin:
Gul til stívt andøvsgul av útnyrðingi og sólglottar, men eisini møguliga okkurt æli. Hitin millum 8 og 13 stig.

Gospelkonsert í Runavík

Nú sunnukvøldið verður gospelkonsert í Ítróttarhøllini í Runavík.

Tað er TLT-Bokking, sum skipar fyri hesi konsertini, eins og teir skipaði fyri gospelkonrtini í fjør og øðrum konsertum, sum hava verið.

Tríggir bólkar verða á konsertini í ár, og bólkarnir eru allir nýggir bólkar, sum rættiliga hava gjørt vart við seg hetta seinasta árið.

Fyrsti bólkurin nevnist „Magni Christiansen". Magni hevur drúgvar royndir í tónleiki og gav herfyri út fløgu við tónleiki, sum er ávirkaður av country og eldri kendum gospelsangum. Á konsertini fer Magni at framføra løg av fløguni umframt aðrar sangir. Við sær á konsertini hevur Magni tónleikarar úr Eysturoynni.

Næsti bólkurin er „Face to Face", sum er nýggjur bólkur úr Eysturoynni. Bólkurin er mannaður við tónleikarum úr ymsum brøðrasamkomum í Eysturoynni. Teir hava ikki áður verið á palli í slíkum tiltaki, men hava spælt til møtir o.a. Tónleikur teirra líkist tí, sum er nógv frammi í dag, m.a. Michael W Schmidt.

Triði bólkurin er „I AM", sm rættiliga hevur dugað at gjørt vart við seg, síðan hann kom fram. Teir vóru t.d. á fløguni, sum TUTL gav út herfyri, og hava fingið sera góð ummælir. Tað ljóðar eisini, at teir ætla at fara uttanlands at spæla.



Fleiri gospelbólkaru eru í landinum. Tein teirra er Elim, sum tó ikki verður á hesi konsertini

A.D.J. Sound tekru sær av ljóðinum á gospelkonsertini sunnukvøldið.

Konsertini verður í Ítróttarhøllini í Runavík, og hon byrjar kl. 21. Kostnaðurin fyri vaksin verður 50 krónur og fyri børn yvir 7 ár 30 krónur. Børn yngri enn 7 ár sleppa ókeypis inn saman við foreldrunum.

Grind í Húsavík

RANDI JACOBSEN

Tað ljóðar, at havið kring Føroyar kókar av grind, men meira sjáldan hevur rakstur fingist á nakran bólk.

Men í gjár eydnaðist tað. Strandfaraskipið Sam fann gjáramorgunin eina lítla grind við Hælin á Hestoynni, og eingin ivi var um, hvar hon skuldi haldast til. Grindin gekk móti Sandoynni, og hon varð dripin á Húsavík fyrrapartin.


Ikki var grindin størri enn slakir 40 hvalir. Bátarnir vóru 32, og fólkini eini 200, so grindin rakk ikki longur at skifta enn til økið, til dráps- og bátspartar.

Men onnur, sum vóru stødd í Sandoynni í gjár, fingu eisini part, tí har hava tey ta skipan, at gestir eisini fáa burturav.

Tað kemur altið væl við at fáa grind, ikki minst sunnanfyri, har grindirnar ikki hava verið so títtar seinastu árini.


í gjár

Tíverri hava vit ikki fingið fatur á frumkortinum




Eitt lágtrýst, 995 hPa. stendur mestsum í stað sunnan fyri Ísland. Eitt minni lágtrýst, 1005 hPa. í landnyrðing úr Føroyum fer norðureftir. Eitt nýtt lágtrýst, 1000 hPa. vestanfyri Írland fer í landnyrðing og fer í kvøld framvið Føroyum vestanfyri og hevur vind og regn við sær.

Móti vikuskiftinum nærkast nýggj brúgvløg Føroyum vestaneftir.



Hitalagið mált frá 1./9. kl 06^{00}–2./9. kl 06^{00}. Hitin í gjár: 11,5°C
Minsti hiti máldur í sept.: +0,5° Hægsti hiti máldur í sept.: 19,5°



Avfallið: 3,0 mm – mált frá 1./9. kl 06^{00}–2./9. kl 06^{00}
Avfallið higartil í : 3,0 mm

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	11
Nuuk	8
Qaqortoq	11
Ammassalik	7
Saint John's	11
Halifax	–
Reykjavík	14
Seyðisfjørður	9
Tórshavn	11
Lerwick	16
Aberdeen	16
London	19
Tromsø	18
Bergen	22
Oslo	23
Stokkhólm	23
Keypmannahavn	23
Helsinki	15
Moskva	8
Berlin	24
Warzawa	20
Kiev	15
Bukarest	–
Paris	19
Madrid	26
Róm	27
Malorca	30
Athen	28
Malta	29
Tunis	31
Beijing	25
New Dehli	29
Bangkok	32
Jakarta	31
Sydney	16
New York	27
Miami	30
Los Angeles	25
Meksikobýur	21
Panama	–
La Paz	13
Rio de Janeiro	–
Buenos Aires	12

Kelda: DMI

Vestfalskyrrindi

1. september: Tendring
2. september: Mánin longst frá jørðini

	Suðuroyar-/Vágafirði fp	sp	Vestmanna-sundi fp	sp	Núlsoyar-firði fp	sp	Haraldssundi/Leirvíksfirði fp	sp	Skúvoyarfirði/Skopunarfirði fp	sp	Hestfirði/Sundalagnum fp	sp
3. sept.	0829	2048	1029	2248	0644	1903	0844	2103	0729	1948	0744	2003
4. sept.	0906	2125	1106	2325	0721	1940	0921	2140	0806	2025	0821	2040
5. sept.	0944	2203	1144	–	0759	2018	0959	2218	0844	2103	0859	2118
6. sept.	1022	2242	0003	1222	0837	2057	1037	2257	0922	2142	0937	2157

sosialurin

- *Samrøður*
- *Kjak*
- *lýsingar*
- *ítróttur*
- *ummæli*
- *viðmerkingar*
- *lesarabrøv*
- *o.m.a.*

5 ferðir um vikuna

Ærin og lambið sluppu við livinum.....




Bilbelti er livbelti!

STRANDA BIO

★ TLF. 48160 ★

Telefonsvararin stendur altíð til



Friggjad. 05.09. kl. 20^{45}
Leygard. 06.09. kl. 19^{00}
Sunnud. 07.09. kl. 23^{00}
Seinasta sýning

DEN STØRSTE GYSER-SUCCES NOGENSINDE!



A WES CRAVEN FILM
SCREAM
t.o.15

GÅ I SIKKERHED I KOMMEN BIFFEN

Mikud. 03.09. kl. 21^{00}
Hósd. 04.09. kl. 21^{00}
Friggjad. 05.09. kl. 23^{00}
Leygard. 06.09. kl. 22^{45}
Sunnud. 07.09. kl. 20^{45}
Seinasta sýning

JIM CARREY



Friggjad. 05.09. kl. 19^{00}
Leygard. 06.09. kl. 21^{30}
Sunnud. 07.09. kl. 19^{00}

Komandi filmur:
12. september: Batman & Robin
19. september: Devil´s own

Hugnalig cafeteria